Ár 1948, 27. mai, kl. $16^{30}$, helt landsstýrið fund. Allir limir vóru á fundi.

Til viðgerðar var málið um, hvussu umsitingarvaldið verður at býta millum limir landsstýrisins.

Samtykt varð at býta umsitingarvaldið soleiðis millum limirnar:

A. Samuelsen, løgmaður.

Spurningar í sambandi við nýskipanina.

Tænastumenninir.

Spurningar Løgtinginum viðvíkjandi.

Staðfesting og kunngering lógtingslóganna.

Kirkjan, harundir hoyrir: Øll tann kirkjuliga skipanin, ritualini, tænastumenn kirkjunnar, kirkjur og kirkjugarðar, inngonga í og úrgonga úr Fólkakirkjuni, meinigheitsráð, valmeinigheitir, sóknarbandsloysing. Tey frá Fólkakirkjuni víkjandi trúarsamfeløg, halgidagslóggávan.

Tryggingarfeløg í Føroyum.

Jarðagrunnurin og tann myndugleiki, sum landbúnaðarministarin hevur havt eftir búnaðarlóggávuni.

Innsavnan og burturlutan.

Ásetanir um framleiðslu av prenti.

Serstakar ásetanir um serliga tíðarrokning.

Val av almennum álitismonnum.

J. P. Davidsen, landsstýrismaður.

Social- og arbeiðaralóggáva: Almen forsorg, serforsorg, fólkatrygging, arbeiðarar, arbeiðaraviðurskifti, lærlidreingir, hjálparmann, frítíð.

Vegir, havnir, strandferðir o. t.: Havnir, tryggjan av strond, kanalir, samferðslumál, harundir vegir, jarnbreyt, sporvegir, ferður, buss- og farmakoyring. Motor- og ferðsluviðurskifti. Góðkennan av havnagjøldum. Vatnorkustøðir, elektrisk virki, loftferðsla.

Kr. Djurhuus, landsstýrismaður:

Kommunal mál, harundir hoyra: Stjórnan av kommunum, eftirlit við teimum, kommunuskattur.

Byggingar- og brunamál, ætlanir um býir, húsaspurningar, leiguspurningar, fólkayvirlit.

Ekspropriatión til serlig endamál.

Finansirnar: Beinleiðis og óbeinleiðis skattur, harundir hoyra eisini stempulgjøld, gjald av totalisatorspæli, gjald av serligum føroyskum happadrátti, meðan gjøld fyri avgreiðslu, so sum skiftisgjøld, rættarsportlar, tinglesingargjøld fara til tann, ið ber útreiðslurnar av ávarandi stovni. Skipan av roknskaparførslu, grannskoðan og decisión viðvíkjandi egnum inntøkum og útreiðslum.

Landbrúk, fiskiskapur og onnur vinnumál. Harundir hoyrir: Almenn búnaðarlóggáva, festi leiga, sundurbýtan, útskifting, húsmannsbrúk, urtaalan, húsdjóraalan, urtagarðsbrúk, hjávinnur búnaðarins, jarðarbót, skógrøkt. Djóralæknamál. Fyriskipanir móti skaðadjórum. Húsdjór, valdgerðir, djóravernd, hundslóg. Jakt og friðan av djórum á territoriinum. Fiskiskapur og friðan av fiski á territoriinum. Matrikulsmál.

Útgerðar-, framleiðslu- og býtingarmál. Prísansan, hámarksprísir. Skamtanir, rabat- og stúdningsskipanir. Tantieme- og vinningsmark. Umfaran við vørum. Reglur um rúsdrekka. Reglur um afturlatingartíð

Matstovur og gistingarhús.

Vinnumál. Handils- og felagsskráseting, skipaskráseting. Handilssemingsmenn, translatørar, dispachørar, vegarar, metarar, Granskoðarar. Goymsluhús. Kommissión, agentur, handilsferðamenn.

Agentur fyri útlendsk handilsfeløg. Bókførsla. Kreditfeløg o. l.

Eftirlit við inn- og útfluttningi.

Skipastrandingar.

Finningargóðs.

Yvirformyndarastova í Føroyum.

Tinglesing.

Politi.

__L. Zachariasen, landsstýrismaður:__

Heilsumál: Læknar, ljósmøður, sjúkrahús, apotek. Harundir hoyra: Embætislæknar, kvakksalvaralóggáva, skipanir móti tuberklum og øðrum smittandi sjúkum, sinnissjúk, vaccinering.

Undirvísing o. t.: Skúlamál. Harundir hoyra bæði fólkaskúlin, provskúlar og skeið, læraraskúlar, ~~fólkaskúlar~~ fólkaháskúlar, eftirskúlar, ungdóms- og kvøldskúlar, húshaldsskúlar, fakskúlar sum handilsskúlar, tekniskir skúlar, navigatiónsskúlar o. s. fr.

Skjalasøvn, bókasøvn, gripagoymslur; undantikin frá hesum verða skjøl ríkisins; fyrivarni verður tikið viðvíkjandi skyldu til at lata prent til kongliga bókasavnið.

Friðan av bygningum, náttúrufriðan.

Sjónleikar- og ljósmyndaloyvi, skemtunarmál.

Telefon, telegraf o. t. Harundir hoyra: Post-, telegraf- og telefonmál í Føroyum, radio.

Eitur spreingievni, vápn.

Ferðamannaviðurskifti.

Ráevni í undirgrundini.

Eins rættindi fyri menn og kvinnur,

Fundur lokin.

A. Samuelsen J. P. Davidsen Kr. Djurhuus Louis Zachariasen.